


*Nr. 16* *4. august 2013* *73. árg.*

# Treyst okkara

*Kastið tí ikki frá tykkum treyst tykkara. Hebr. 10, 35.*

Hetta er ein løgin áminning, tí treysti er ikki nakað, vit hava ov mikið av. Hví skuldu vit kasta tað sindrið av treysti burtur, sum vit møguliga hava.

Áminningin er send menniskjum, sum eru undir stórum trýsti fyri sína trúgv. Tað kenna vit ikki nógv til, tí ongin rørir eitt hár á høvdi okkara, orsaka av at vit trúgva á Gud. Men áminningin er neyðug. Fíggindin hevur nevniliga góð arbeiðskor, um mótloysi og mistreysti fáa valdið, og vit blaka frá okkum, um vit møta mótgangi í lívinum.

Kastið altso ikki treyst tykkara frá tykkum. Tað ljóðar, sum um tankaloysi er orsøkin til, at treystið hvørvur, og júst soleiðis er tað. Er treystið burtur, er tað tí, at vit onki samband hava við Gud. Nær er vandin størstur, í ljósum ella truplum tíðum? Spurningurin er torførur. Í ljósum tíðum gloyma vit tøkkina, og í trongum tíðum svíkur trúgvin. Í báðum førum verður sambandið slitið, og treystið hvørvur. Tankaloysi er orsøkin til tess. Tí mugu vit hvønn dag geva okkum stundir at kanna, um sambandið er í lagi. Tá fer Gud undir lívsins umskiftiligu korum at syrgja fyri at geva okkum treysti í røttum tíma.

Viðurskiftini eru tey somu við treystinum sum við friðinum, gleðini og kraftini. Treystið er ein fylgja av onkrum øðrum. Sambandið við Gud má vera í lagi. Tað er ómøguligt at varðveita treystið einsamallur. Bara um vit hava samband við tann altvaldandi Gud, kunna vit anda frítt. Tað vil við øðrum orðum siga, at trúgvin á Heilagan Anda skapar tað sanna treystið. Gud gevi okkum at uppliva hvítusunnugleðina. Hvítusunnudag fingu lærusveinarnir lut í tí ókúgandi treystinum.

# Summarsólskin

Heimbygdin lá vøkur og kvirr. Ein vakran summardag fór eg mær út í kirkjugarðin. Eg hugsaði, at kanska var tað eitt sindur løgið ein slíkan heiðursdag at ganga og hugsa um deyðan.

Sum eg skimaðist í allar ættir, sá eg hin óreingiliga veruleikan, at í lívsins blóma valdar tó deyðin. Har stóðu nýggir gravsteinar við nýristum kendum nøvnum og orðum og gamlir gravsteinar, sum veður og vatn høvdu máað burturav.

Æviskeið menniskjans er stutt – enntá longsta. Henda veruleika hevur vísur maður  rikið saman í nøkur orð.

”Tú kemur, tú fert, tú verður gloymdur.“

Menniskju gloyma teg skjótt; men Gud gloymir teg ikki. Øll skulu vit einaferð rísa úr moldum, og dagurin nærkast.

”Undrist ikki á tað, tí einaferð kemur tann dagurin, tá ið øll tey, sum eru í grøvunum, skulu hoyra reyst Guds.”

Tey eiga stóra signing, sum hava hoyrt reyst hansara ta tíð, sum vit enn eiga.

Meðan eg stóð og hugsaði um hetta í skugganum, sá eg ein gamlan mann sita á einum steini í kirkjugarðinum. Á útsjónd hansara sá eg, at hann hevði sæð mong summør og nógvar vetrar. Mær tókti, at hann neyt hvíldina og skuggan. Eg setti meg undir liðina á honum og hevði á munni:

”Gamli vinur, tygum hava livað í árini mong.”

”Ja,” svaraði hann,” so er, sum tygum siga.”

„Hava tygum búð alla tíðina her í bygdini?”

„Eg eri føddur her, vaksin upp her og havi búð her øll árini. Eg haldi ikki, at eg havi verið meira enn fjúrtan dagar burturstaddur.”

”Tygum munnu hava sæð nógva broyting øll hesi árini. Tey flestu, tygum kendu á ungum árum, eru óivað farin.”

”Ájú,” suffaði hann og leit út á øll leiðini.

”Og skjótt fara tygum sama vegin.”

”Jú, eg vænti ikki mong árini afturat,” svaraði hann spakuliga.

”Eiga tygum eina livandi vón í tí, sum stundar til?“

”Jú, eg trúgvi, eg eigi,” svaraði hann.

”Í Skriftini stendur, at onki óreint skal síggja himmalin – bara tey, ið skrivað eru í lívsins bók.”

”Eg eri doyptur sum barn og havi strembað eftir at liva í hesi stóru náði, sum mær varð givin í dópinum. Og Harrin hevur styrkt meg og hildið hond sína yvir mær. Eg leggi meg og míni í Harrans hond morgun og kvøld, og eg biði Harran fyrigeva okkum misbrotini.”

”Og hetta er nóg mikið?” dittaði eg mær at spyrja.

”Hetta stendur í Harrans hond. Jú, eftir stríðsins øld, gleðist eg um miskunn hansara og náði. Lýsi so Harrin yvir vári leiði ró – við glæmu tær sólfalsstundir.”

Eg fór stillisliga frá honum og styrktur. Sólin skein í sál hansara. Nú var hugur mín léttur og fróur. Fyri mær skein summarsólin heit og bjørt – enntá í hesum deyðans garði.

*t.* týddi.

# Miðvegurin

Ein maður kom einaferð til ein prest, sum hevði prædikað greidliga um hin smala vegin. Maðurin segði við prest, at hann kundi havt hug at hoyrt eitt sindur um miðvegin, sum prestur ikki hevði sagt eitt orð um. Hin breiða vegin gekk hann ikki, men heldur ikki tann smala, sum prestur so dúgliga hevði prædikað um.

Nei, prestur mátti hava ein miðveg at tosa um, sum maðurin so leingi hevði hugsað sær at gingið.

Prestur gjørdist kløkkur og segði, at tað var ongin miðvegur, og endin var tann, at presturin og maðurin fullu á knæ og bóðu um mátt at ganga hin smala vegin, sum prestur hevði prædikað um og sjálvur ikki gingið.

*t.* týddi.

# Svarti hesturin í Opinberingini

Meðan vit koyra millum býirnar við Svartahavsstrondina, hugsaði eg um tey blóðigu kríggini, sum eru farin fram her, og tankarnir fóru til tann Reyða krígshestin í Opinberingini. Tað hava verið og eru nógv kríggj á jørðini á okkara døgum. Men Bíblian sigur okkum eisini um inflasjón, har matvøruprísirnir bólgna upp og gerast himmalhøgir, og um hungursneyð, tá ið Svarti hesturin kemur aftaná:

“Og tá ið tað læt upp triðja innsiglið, hoyrdi eg triðju veruna siga: “Kom!” Og eg sá, og sí: Svartur hestur; og tann, sum á honum sat, hevði vekt í hondini á sær; og eg hoyrdi sum eina rødd mitt ímillum hinar fýra verurnar, sum segði: “Eitt mál av hveiti fyri denar, og trý mál av byggi fyri denar.” (Opb. 6,5-6)

Hetta eru himmalhøgir matprísir: Ein litur av hveiti fyri eina dagløn! Tríggir litrar av byggi fyri eina dagløn! Og eftir hetta fylgdi Deyðin á Bleikgulum hesti, sum drap við svørði, HUNGURSNEYÐ og pest.

Ivan Chekhunov, bispur, gramdi seg um teir høgu matvøruprísirnar, tí at kornið verður brúkt til biodrívmegi. Men bara eitt kolanám í Kina spýr út umleið líka nógv CO2, sum allir bilar í Noregi tilsamans.

*Effie Campbell* umsetti.

# Kasta alla sorg tína á Harran

Ein maður sigur soleiðis frá:

Einaferð fór eg niðan á eitt høgt fjall í Sveis. Ein álítandi leiðvísari fylgdi mær. Lívsstarv hansara var at fylgja ferðafólki á útferðum uppi í fjøllunum Umframt ta tænastu, hann gjørdi mær henda dagin, gav hann mær – tó hann visti ikki av tí - hentan lívslærdóm.

Tað fyrsta, hann gjørdi, var at taka viðførið frá mær og leggja tað á herðar sínar. Beinanvegin bað hann meg lata seg fáa alt, tí eg hugsaði, at eg sjálvur kundi bera nakrar smálutir, sum eg ikki leit honum at bera.

Men skjótt gjørdist eg varur við, at hesir løttu smálutirnir darvaðu meg, tá ið bratt og grýtut var at sleppa upp á fjallið. Eg læt hann tó ikki fáa hesar smálutirnar, fyrr enn hann fólkaliga, men avgjørdur, kravdi, at eg skuldi geva honum alt at bera uttan fjallstavin. Eg gjørdi veruliga, sum hann kravdi. Nú eg gekk berbakaður, kendi eg beinanvegin ein lætta og fekk nýggja megi at stíga upp á fjallatindin.

Tá ið eg leysur og léttur gekk niðan gjøgnum ein brattan stíggj, hoyrdi eg eina rødd teska: ”Á, mítt ringa og stívrenda hjarta! Hevur tú veruliga latið Harran fáa byrði tína? Tær nýtist onki at bera, og tú hevur heldur ikki rætt at gera tað.”

Hetta rann týðiliga upp fyri mær sum ongantíð fyrr. Og meðan eg nú berbakaður og léttur gekk aftan á álítandi og blídliga leiðvísa mínum hamara av hamara, segði eg við meg sjálvan: ”Á sama hátt skal eg fylgja Jesusi, sum leiðir meg og vísir mær leiðina – og biður meg leggja allar byrðar mínar á seg. Eg skal geva honum tær. Eg skal kasta alla sorg mína á hann, tí at hann hevur umsorgan fyri mær.”

*t.* týddi.

# Faðir vár

Tá ið kendi norski prædikumaðurin Hans Nielsen Hauge lá á deyðastrá, hevði hann hesa formaning til vinirnar, sum stóðu rundan um songina: ”Fylgið Jesusi!”

Síðani legði kona hansara seg á knæ niður við songini, og hon og Hauge bóðu Faðir vár saman. Tá ið tey vóru komin í helvt, hoyrdist bara rødd hennara – undir Faðir vár varð hesin trúfasti Harrans tænari heimkallaður.

---

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74